## DAGSINS MEINING

# Stórhending – LV eigur at fáa sín natúrliga lut aftur

Føroyar gjørdust størri hósdagin, tá tað varð landfast millum Streymoynna og Vágar. Vágar eru nú ein partur av meginøkinum saman við Eysturoy og Streymoy. Gongur sum ætlan, verða Borðoy og Viðoy partur av føroyska meginøkinum um eini fimm-seks ár.

Sjálvandi er ringt at spáða um, hvønn týdning hetta nýggja samferðslukervið fer at fáa. Men einki er at ivast í, at tað fær stóran týdning fyri føroyskt vinnulív og mentanarlív. Handilslívið verður helst eisini ávirkað.

Men vit mugu vóna, at bøttir samferðslumøguleikar ikki fara at elva til eina størri miðsavnan enn vit hava sæð higartil. Kortini mugu rokna við, at tað verða nakrir deplar, og at eitt øki sum Skálafjørðurin verður sterkur og miðsvnandi í hesi gongd.

Tá síðsta skotið varð latið av hósdagin, høvdu vit samstundis prógv fyri, at tað letur seg gera at bora undirsjóvartunnlar í Føroyum. Ikki tí, tað er ikki øðrvísi enn at bora tunnlar á landi. Men tað skerst ikki burtur, at summi hava verið ivingarsom.

Harafturat vísir Vágatunnilin okkum, at íløgan í ein tunnilin er samfelagsliga bíligari í longdini. Kostnaðurin við øllum er mettur til umleið 200 mió.kr. Tað er kanska meiri enn ein nýggj ferja og ábøtur á ferjulegu kostar, men tunnilin skal ikki endurnýggjast sum so eftir einum 15-20 árum.

Ein slík meting liggur eisini til grund fyri samtyktini at gera ein undirsjóvartunnil undir Lorvíksfjørð. Ein nýggj ferja fer óivað at kosta helmingin ella meiri av tí sum ein undirsjóvartunnil kostar. Harafturat hevur eitt skipasamband altíð sínar avmarkingar - t.d. siglingartíðir og veður.

Eisini skulu vit hugsa um, at trygdin sum heild verður størri í Føroyum. Lættari verður at koma á Landssjúkrahús, lættari er hjá sløkkiliðum og bjargingarfeløgum at koma fram, um vanlukkur ella størri eldibrandar eru. So fyrimunirnir eru nógvir.

Alt Føroya land fegnast. Og tað er at fegnast um, at eitt sameint Løgting tók undir við Norðoyatunnlinum. Tí var tað ikki sørt tápuligt, og undir alla sóma, at sambandsmenn hildumeiri ella minni partapolitiskar valrøður á veitsluni í Miðvági hóskvøldið.

Einasta, vit kunnu harmast um, er, at Landsverkfrøðingurin líkasum varð tikin burtur úr verkætlanini at gera Vágatunnilin. Hesin føroyski stovnurin við nógvum royndum og stórari vitan eigur aftur at fáa sítt natúrliga lut, tá nýggjar verkætlanir á hesum øki skulu fremjast.

Tað kendist veruleikafjart tá felagskommunan í Vágum knappliga kom í fjølmiðlar við uppskotinum um ein Vágatunnilin fyri 15 árum síðani. Men tað, sum tá var veruleikafjart, er í dag veruleiki. Tillukku.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tað loysir seg at stríðast og ikki gevast

**Helena Dam á Neystabø**
*løgtingskvinna*



Tað loysir seg at stríðast og ikki gevast - hóast uppskotið ikki gevur 1000 kr. meira um mánaðin til tann, sum bara hevur fólkapensjónina at líta á - so ræður um at fáa uppskotið samtykt so skjótt sum møguligt.

Eg má siga, at eg eri fegin um, at tað nú sær út til, at samgongan vil hækka pensjónirnar hjá okkara fólkapensjonistum. Landsstýrið hevur sett sær fyri at hækka viðbøturnar við uml. 400 kr. um mánaðin, og at gera grundarupphæddina skattafría. Harumframt skal tað loysa seg betri at hava aðra inntøku umframt pensjónina.

Man má siga, at tað loysir seg at stríðast og ikki at gevast. Tí nú síggja vit úrslitið. Eftir at samgongan í fleiri umførum feldi uppskot um at hækka fólkapensjónina munandi í 2002, tá ið fíggjarlógin var til viðgerðar, so hava jólini haft góða ávirkan. Tí longu nú, áðrenn Løgtingið hevur haft sín fyrsta fund, aftaná at Fíggjarlógin var samtykt, hevur landsstýrið ásannað, at sjálvandi skulu pensjónirnar hækka. Og eg ivist onga løtu í, at uppskotið verður samtykt.

Hugsa vit okkum, at einki uppskot um at hækka pensjónirnar var samtykt. So vóru vit í teirri margháttligu støðu, at pensjonistarnir bara høvdu upplivað stóru búskaparligu framgongdina í Føroyum sum eina tunga byrðu. Tí - tá ið tað gongur framá í landinum, ja so verður tað eisini dýrari at liva. Tað vita øll. Men inntøkan hjá pensjonistum hækkar bert, um vit í Løgtinginum samtykkja at hækka pensjónirnar. So latið okkum koma til arbeiðis ongantíð ov skjótt, at fáa samtykt uppskotið.

Gott nokk fær tann pensjonistur, sum bert hevur sína fólkapensjón at liva fyri ikki tær 1000 kr. meira um mánaðin, sum eg havi mett vera neyðugt, og sum eg veit er tað einasta rætta. Men hann fær uml. 400 kr. meira um mánaðin, og tað er heldur ikki so galið.

Tann sum orkar at forinna sær nakrar krónur umframt pensjónina fær møguleika at forvinna 44 túsund krónur um árið ella 3.600 kr, uttan at pensjónin harfyri minkar. Hetta er eisini ein bati.

Lat okkum fáa hesar ábøtur samtyktar so skjótt sum møguligt. Tað sum síðani er eftir til tess at fáa virðilig viðurskifti fyri føroyskar pensjonsistar fer tað óivað eydnast at fáa uppá pláss í næstum.

- Og so havi eg eina vón um at tær 400 kr. undir viðgerðini kunnu koma uppá 1000 kr. meiri um mánaðin, soleiðis sum eg skeyt upp í mínum uppskoti.

# Raðfestir egin áhugamál fram um børnini

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur*



Býráðið samtykti við 7 atkvøðum fyri at lata Sp/f Høgna Mikkelsen og Búsetur byggja hvør sín barnaansingarstovn. Hetta hóast ein metingarnevnd við serkønum fólkum ráddi til at taka av tilboðinum frá Pf Búsetur.

Uppgávan hjá metingarnevndini var at døma um innkomnu uppskot til dagstovnarnar eftir eini frammanundan ásettari virðisreglu, sum sigur, at dømingin skal metast soleiðis:

| | |
|---|---|
| Kostnaður | mett við 40 % av 100% |
| Útsjónd og innrætting | mett við 40 % av 100% |
| Tilfarsval | mett við 20 % av 100% |

Metingarnevndin kom til hesa niðurstøðu: »Bólkurin staðfestir, at av innkomnu tilboðunum eru tilboðini frá Sp/f Búsetur tær bestu verkætlanirnar, hóast tilboðini ikki eru bíligast. Ætlanin vísir nógvar dygdir í útsjónd, innrætting, inniklima, brúksvirði og pedagogiskum møguleikum.

Við støði í dømingini verður mett, at kommunan sum heild fær mest burtur úr við at taka av tilboðunum frá Sp/f Búsetur«.

Javnaðar- og Tjóveldisumboðini í býráðnum mæltu til at taka av tilboðinum frá Búsetur. Við teirri grundgeving at hesir bygningar lúka nútíðarkrøv til ein barnagarðsstovn, bæði hvat viðvíkur børnum, starvsfólkum og at metingarnevndin sigur, at hetta uppskotið er nógv tað besta í innrætting og arkitekturi.

At samgongulimir velja at taka av tveimum ymiskum tilboðum er skelkandi, serliga tá ið annar av tilboðsgevarnum sjálvur er býráðslimur og limur í samgonguni. Eg kann ikki lata vera við at hugsa, at um Høgni Mikkelsen ikki var býráðslimur, so hevði meirilutin heldur ikki tikið av hesum tilboð. Tí prísmunurin er lítil, tá ið hugsað verður um, at kostnaðurin bert telur 40% av samlaðu metingini. Samgongan velur her egin áhugamál framm um trivnaðin hjá børnunum og starvsfólkunum í Kommununi.

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Vælferð ella lívsinnihald?

**Álvur Kirke**



**Vælferð**
Eitt vælferðarsamfelag er eitt samfelag, sum hevur materiella vælferð!

Materiell vælferð er sjálvt málið hjá flestu politikiskum flokkum.

Sjálvt í stríðnum um fullveldi ella samband, er materiella vælferðin tikin fram, sum nakað ómissandi.

Eingin vil offra eitt lítið sindur av materiellu vælferðini fyri at fáa fullveldi.

Materiella vælferðin verður máld og vigað á ymiskan hátt:

Hvussu nógvir bilar eru fyri hvørji hundrað fólk? Hvussu nýggir eru bilarnir?

Hvussu nógvar telefonir eru fyri hvørji hundrað fólk?

Hvussu nógvar teldur eru fyri hvørji hundrað fólk? o.s.fr..

**Prísurin fyri vælferðina**
Men, hvør er prísurin fyri hesa "vælferð"? Hvussu við lívsinnihaldinum?

Hvussu nógvar tímar hevur barnið saman við foreldrum sínum?

Hvussu nógvar tímar hevur mamman saman við børnum sínum?

Hvussu nógvar tímar hevur pápin saman við børnum sínum?

**Hvat fáa vit burturúr?**
Hvat fáa vit burturúr at leika so í? (at skunda okkum so) Eru vit glaðari nú enn fyrr?

Vit hava køliskáp, frystiboks, kaffimaskinu, uppvaskimaskinu, vaskimaskinu, og kortini røkkur tíðin ikki til.

**Nýfødda barnið ein samfelagsligur trupuleiki**
Tá ein kvinna verður við barn, átti tað at verið ein gleðilig hending. Men nú er hetta vorið ein stórur samfelagsligur trupuleiki.

**Vøggustovur**
Sagt verður, at samfelagið hevur ábyrgdina av at fáa mammuni eitt ansingastað til barnið, tí mamman skal út aftur at arbeiða, skjótast gjørligt eftir barnsburð.

Hetta neyðars barn verður so koyrt í vøggustovu hvønn morgun, tí mamman noyðist til arbeiðis.

Tá mamman kemur frá arbeiði, er hon so móð, at hon ikki orkar at geva barni sínum tann kærleika og ta umsorgan, sum barnið hevur brúk fyri.

**Barnagarðar**
Tá barnið verður eitt sindur størri, verður tað koyrt í barnagarð. Foreldrini arbeiða allan dagin, og tá tey koma frá arbeiði, er skjótt tíð at koyra børnini í song.

**Trivnaður barnanna**
Fyri 40-50 árum síðani var tað vanliga, at mamman var heima. Børnini spældu heima ella nærhendis heiminum. So hendi tað, at eitt barn datt og fikk ilt. Barnið fór at gráta, og rópti: "Mamma, mamma", og fór til mammuna.

Var mamman ikki heima, so búðu omman og abbin somikið nær, at tey kundu ansa eftir børnunum onkra løtu. Børnini høvdu tað gott og trygt. Og tey trivust væl.

**Børnini skulu mennast**
Nú verður sagt, at børnini skulu í vøggustovu og í barnagarð, tí tey skulu "mennast". Hvat so við okkum og foreldrum okkara? Hvat varð av menningini hjá okkum? Hava vit havt ein vánaligan uppvøkstur? Mennast vøggustovu- og barnagarðsbørnini betri enn vit gjørdu? Verða tey betri samfelagsborgarar?

**Omma og abbi skulu ikki passa børn**
Eisini siga tey klóku, at ommur og abbar ikki skulu passa børn. Tey duga ikki! Slíkt tvass! Nógv børn eru uppvaksin hjá ommu og abba, og eingin hevur fingið skaða av tí, - tvørturímóti.

**Skúli**
Tá barnið fer í skúla, endurtekur sama søgan seg. Men nú kemur barnið heim áðrenn foreldrini eru liðug at arbeiða. Omman og abbin eru farin á røktarheim, tí eingin var at taka sær av teimum. Barnið má so royna at klára seg sum frægast, til foreldrini koma frá arbeiði.

**Foreldrini strongd**
Flestu foreldur vildu gjarna verið nógv meira saman við børnunum, men tey hava ikki ráð. Tey hava hús at gjalda, og tað ber ikki til uttan tvær inntøkur.

Foreldrini verða strongd. Tey eru sum maskinur, sum arbeiða og arbeiða fyri at varðveita "vælferðina". – Men, hvar er lívsinnihaldið?

Nær hava tey tíð at njóta "vælferðin"?

**Tey gomlu**
Tá hesi foreldur hava strítt seg ígjøgnum, og fylla 67 ár, so skulu tey liva av eini fólkapensión, sum helst ikki røkkur til at liva fyri.

Nú verða tey ein trupulleiki fyri samfelagið. Sagt verður, at skjótt vera so nógvir pensiónistar, at tað almenna ikki orkar at gjalda.

Og eru tey ikki nóg røsk til at klára seg sjálv, so fáa tey neyvan hjálp frá børnunum, tí nú mugu tey, sum einaferð vóru børn, út at arbeiða allan dagin, fyri at klára seg.

So mugu tey gomul á røktarheim. Men har er einki pláss!

**Eitt sjúkt samfelag**
Myndin omanfyri er veruleiki hjá mongum, og hetta vísir, at samfelagið er sjúkt! Tí verður neyðugt at kanna, hvat kann gerast! Helst er eingin einføld loysn.

**Framtíðin**
Men vit kunnu byrja við at staðfesta, hvussu støðan er.

Síðani mugu vit finna út av, hvat slag av samfelag vit vilja hava í framtíðini.

Spurningurin er m.a., um vit skulu raðfesta "vælferðina" fram um lívsinnihaldið.

Skulu vit offra børnini og tey gomlu fyri okkara materiellu vælferð, sum ikki gevur okkum eitt betri lív?

Skulu vit offra børnini og tey gomlu fyri okkara materiellu vælferð, sum vit kortini ikki hava tíð at njóta?

Miðflokkurin fer at gera sítt til, at vit fáa eitt betri og menniskjaligari samfelag, har lívsinnihaldið verður raðfest minst líka frammarlaga, sum materiella vælferðin.

# Vís mær eina loysn, ið var ómøgulig, Høgni Hoydal!

**Thomas Arabo**

Varaløgmaður er hjartaliga vælkomin at endurgeva meg í so góðum selskapi sum við sitatum av Olof Palme, men eitt minsta krav má vera, at endurgevingin er røtt. Tað er ikki til nakran sóma hjá Høgna Hoydal, tá hann klípir orð uppí fyri at venda meiningini til tað, sum hann sjálvur vil hava.

Eg má rætta Høgna Hoydal tá hann sigur: Thomas Arabo vil bert gera tað sum er møguligt "í verandi støðu". Tað rætta er: Thomas Arabo vil gera tað sum er møguligt - punktum.

**Tað ómøguliga hjá Varaløgmanni**
Tað virkar sum varaløgmaður er djúpt forfardur, tí vit eru nøkur í hesum samfelagnum, ið vilja finna tað møguliga, ístaðin fyri tað ómøguliga. Meg lysti at frætt, hvat Høgni Hoydal ætlar, um hann sjálvur sær, at hansara planir ikki eru møguligar. Tað er í lagi, at hann flaksar við ørmunum fyri at fara á flog, men tað skal hann ikki brýggja seg um at gera fyri skattgjaldarans pening.

Í einum demokratiskum samfelagi er tað so, at einki er møguligt uttan fólksins vilja. Vil fólkið ikki loysing, so má loysingin bíða, so einfalt er tað. Tað nyttar



einki at gera seg ómøguligan, so sum Tjóðveldisflokkurin ger í løtuni.

Høgni Hoydal klárar tað ómøguliga, um hann kann peika mær á nakað, ið er hent nakrantíð, sum ikki var møguligt.

**Lágt tænastustøði, tí alt má víkja fyri loysingini**
Javnaðarhugsjónin byggir uppá vælferðarsamfelagið. Vælferðarsamfelagið er ikki nøkur sjálvfylgja, og tað stendur nógv á í løtuni, nú fólkaflokkurin situr á øllum innanlandspolitikkinum í Føroyum

Tað var møguligt at byggja upp vælferðarsamfelagið, og tí komu menn á mál. Hevði tað verið ein ómøguligheit, so var einki vælferðarsamfelag. Tað er annars at gleðast um, at Høgni Hoydal hevur Danbjørg, Dam og Palme sum fyrimyndir, og vóni eg, at hetta fer at skína betri ígjøgnum framyvir.

Tað tekur ikki langa tíð at bróta tað niður, ið varð bygt upp í áratíggjur. Vit fáa, sum tað ljóðar, í næstu framtíð eina pensiónsskipan, har hvør er sær sjálvum næstur. Hetta skræðir samhaldsføstu skipanina, ið vit hava grundað okkara pensiónspolitikk á, burtur. Fer Tjóðveldisflokkurin at taka undir við tí?

Undanfarni stjórin á sjúkrahúsverkinum segði, at pengar væntaðu í. Fyri fyrstu ferð nakrantíð fingu vit hópuppsagnir á sjúkrahúsinum vegna væntandi játtan til eina deild. Yvirlæknarnir, ið hava verið í bløðunum herfyri hava eisini víst á manglandi ressoursir í øllum sjúkrahúsverkinum. Trupulleikin tykist ikki bert at verða játtanin til eina deild, men til alt sjúkrahúsið sum tað er.

Høgni Hoydal sær eftir øllum at døma ikki nakran trupulleika. Hann tosar ístaðin um forsømilsi í mong, mong harrans ár. Nú valdast tíð – í mínari verð eru tíggju ár ikki "mong, mong harrans ár". Munur er at lækka tænastustøðið av neyð, og so bevíst halda tað lágt, tí at alt má víkja fyri loysingini.

**Finnið loysnir**
Tað er skeivt at draga grønlendingar uppí fullveldismálið. Eg havi altíð trúð uppá samstarv í útnorði og geri tað enn. Eg trúgvi eisini uppá gott samstarv við japanesarar, men tað merkir ikki, at eg haldi, at teir skulu fortelja okkum, um vit skulu loysa ella ikki.

Valskeiðið endar skjótt og vit mugu, hóast Høgnasa visiónir og vælmeinandi sitatir, konstatera, at skúla-, heilsu- og almannaverkið eru syndarliga forsømd. Ikki tí, at tað hevur verið ov lítið av peningi til, men bara tí, at ov lítil vilji hevur verið at gjørt nakað – frá millum øðrum Tjóðveldisflokkinum. Tað eru nógvir føroyingar og ikki minst vit í javnaðarrørsluni, ið eru ógvuliga fortørnaði yvir hetta álitisbrotið frá einum flokki, ið var stovnaður sum ein sosialistiskur flokkur. Omanfyristandandi mál mugu loysast skjótast gjørligt og vónandi tekur Tjóðveldið annað skinn um bak hesum viðvíkjandi.

Ríkisrættarliga málið er skjótt loyst, tí ein breið semja kann lætt fáast, um bert Tjóðveldið lorar eitt sindur. Høgni Hoydal tosar rættiliga firtin um, hvussu góðan vilja Tjóðveldisflokkurin hevur til at finna felags loysnir. Spæl út - finn eina felags loysn! Nú er tú tikin uppá orðið Høgni!

## Tøkk

Hjartans tøkk veita vit øllum tykkum,
ið við forbønum, gávum, blómum,
vitjan og ugga hjálptu okkum
tá elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Jafet Olsen,**
Runavík

* 24. februar 1939
† 26. desember 2001

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

Harrin signi tykkum øll.

**Thurid og synirnir við familju**